# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya



Fyri tíðarskeiðið 23. oktober 2015 til 21. oktober 2016

ATLANTIC AIRWAYS

# Felagsskapurin

Seinasta árið hevur starvsnevndin í Svimjisambandi Føroya verið hendan: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Dann Hjelm, næstformaður, Anni á Hædd, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Katrin Sørensen, nevndarlimir, umframt Anita R. Nysted tiltakslimur. Samstarvið hevur riggað væl.

Hin 14. november 2015 fingu vit endiliga aftur eina svimjinevnd, tá ið Annika Næs Johannesen, Palli Vang, Edmund Thomsen og Søren Antoft játtaðu at fara í hesa. Nýggja nevndin tók sær serliga av fyriskipanini av meistarastevnum okkara, FM 2016 á langgeil og stuttgeil umframt JM/MU 2016, har eisini Jon Hestoy hjálpti væl til við at fyriskipa FM á stuttgeil. Sum heild vórðu hesar uppgávur fyrimyndarliga avgreiddar, saman við lokalum kreftum, hóast serliga FM á langgeil var ein avbjóðing, við tað at hetta var okkara fyrsta meistarastevna nakrantíð á langgeil.



Tíverri hava allir svimjinevndarlimir uttan ein nú biðið seg undan, so at SSF í løtuni aftur ikki hevur nakra svimjinevnd. Hetta er ein sera óheppin støða, sum starvsnevndin tí eisini roynir at finna eina loysn uppá, saman við feløgunum.

Hin 16. juni fingu vit hartil eina nýggja landsliðsnevnd, tá ið Katrin Sørensen, Petur Heðin á Fløtti og Rúna í Skála játtaðu at vera hendan. Tey byrjaðu við at meta um ætlaðu kravtíðarskipanir til svimjiárið 2016-2017, og vórðu hesar so kunngjørdar nú við ársbyrjan av svimjiárinum 2016-2017.

Jórun Eið Johannesen tekur sær av svimjiskúlanum, men hevur hetta virksemið ligið stilt, farna árið. Nú komandi eru tó ætlanir um skeið, bæði innanfyri og uttanfyri SSF. Dann Hjelm fyriskipar eitt næsta yvirdómaraskeið, sum fer at føra við sær eisini vanlig dómaraskeið, og Sørin S. Djurshuus stendur á odda fyri lívbjargingarátakið okkara, sum tekur meira og meira dik uppá seg.

Í mastersnevndini sita: Eyðun Húsgarð, formaður, Torkil Mørkøre og John Olsen. Hendan nevnd tekur sær serliga av at fyriskipa FOMM, og varð hendan uppgávа væl røkt eisini til FOMM 2015, saman við vertsfelagnum Ægir.

Í dómsnevndini hava sitið Janus Rein, formaður, og nevndarlimir Poul Poulsen og Jórun Eið Johannesen. Dómsnevndin hevur ikki havt nakað mál á skrá, hetta farna árið.

Djóni Dalsgarð er aðalskrivari í Svimjisambandinum, og hevur skrivstovan riggað væl. Símun Michael Sørensen kom til sum kassameistari í fjør, og hevur nú avgreitt roknskapirnar fyri 2014 og 2015 við ágrýtni og nærlagni, har serliga hesin síðstu hevur tikið tíð og orku, vegna umlegging til bruttotøl og eina rúgvu av bókingum frá Nordic Open Masters 2015.

Kalendarafundurin fyri 2016-2017 varð hildin í ÍSF-húsinum hin 1. apríl 2016, umframt ein eyka kalendarafundur aftur hin 24. september 2016. Hesin seinni til at fastleggja FM 2017 á stuttgeil. Næsti kalendarafundur er enn ikki settur á skrá, men verður væntandi á vári 2017.

Afturat okkum sjálvum í Svimjisambandinum, eru ein rúgva av góðum kreftum úti í feløgunum, sum vit meira enn so hava dúvað uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, sum vit lukkutíð enn fáa meira ella minni fyri einki, føroyskari svimjing at frama.

# Kappingarárið 2015-2016

## Føroyskar stevnur

Føroysku svimjifeløgini og SSF skipaðu kappingarárið 2015-2016 fyri tilsamans 12 svimjistevnum og 4 meistarastevnum í svimjihøll, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung, vaksin og masters. Sum nakað serligt fingu vit hetta árið eisini ein langhyl at kappast í.

### HS-stevna á Argjum 19. september 2015

26 kappingar, 4 feløg, 56 íðkarar og 165 úrslit.

### SuSvim-stevna í Vági 26. - 27. september 2015

32 kappingar, 4 feløg, 79 íðkarar og 533 úrslit. Besta úrslit gav 679 FINA stig, tá ið Signhild Joensen (2000) úr Ægir við 2:15.64 setti nýtt føroyskt juniormet í 200 rygg.

**Føroyskt juniormet (25m)**
Signhild Joensen (2000), Ægir 2:15.64 í 200 rygg

### Ægir-stevna í Klaksvík 24. - 25. oktober 2015

35 kappingar, 6 feløg, 113 íðkarar, 47 liðsvimjingar og 687 úrslit. Besta úrslit gav 718 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 400 frí við tíðini 3:56.99.

**Føroysk juniormet (25m)**
Sára Nysted (2001), SuSvim 1:05.74 í 100 blandað
Signhild Joensen (2000), Ægir 2:15.40 í 200 rygg

### Reysta-stevna í Leirvík 31. oktober 2015

29 kappingar, 6 feløg, 94 íðkarar, 11 liðsvimjingar og 350 úrslit.

### FOMM í Klaksvík 7. november 2015

17 kappingar, 3 feløg, 38 íðkarar, 7 liðsvimjingar og 126 úrslit. Besta úrslit gav 388 FINA stig.



## HS-stevna í Gundadali 19. november 2015

34 kappingar, 6 feløg, 104 íðkarar og 580 úrslit. Besta úrslit gav 755 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 400 frí við tíðini 3:53.05.

**Føroyskt juniormet (25m)**

Róland Toftum (1998), SuSvim 2:20.10 í 200 bringu

## FS-stevna í Fuglafirði 21. november 2015

Á startlistanum: 27 kappingar, 6 feløg, 146 luttakarar.

## HS-stevna í Gundadali 19. desember 2015

Hendan stevna varð avlýst vegna eldsbruna í Svimjihøllini í Gundadali.

## SuSvim-stevna í Vági 9. - 10 januar 2016

24 kappingar, 2 feløg, 35 íðkarar og 127 úrslit. Besta úrslit gav 734 FINA stig, tá ið Sára Ryggshamar Nysted (2001) úr Suðuroyar Svimjifelag við 4:24.20 setti nýtt føroyskt met og juniormet í 400 frí.

Hetta var fyrsta stevna nakrantíð á langgeil í Føroyum.

**Føroysk met og juniormet (25m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 4:24.20 í 400 frí, 58.91 í 100 frí, 9:12.01 í 800 frí

## FLOT-stevna á Toftum 30. januar 2016

26 kappingar, 6 feløg, 101 íðkarar, 12 liðsvimjingar og 290 úrslit.



## Ægir-stevna í Klaksvík 13. - 14. februar 2016

40 kappingar, 6 feløg, 121 íðkarar, 57 liðsvimjingar og 685 úrslit. Besta úrslit gav 771 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 1500 frí við tíðini 15:24.66.

**Føroysk met og juniormet (25m)**

Signhild Joensen (2000), Ægir 2:14.74 í 200 rygg

## Reysta-stevna í Leirvík 27. februar 2016

28 kappingar, 6 feløg, 103 íðkarar, 15 liðsvimjingar og 344 úrslit.

## FM á langgeil í Vági 11. - 13. mars 2016

58 kappingar, 5 feløg, 52 íðkarar, 19 liðsvimjingar og 430 úrslit. Besta úrslit gav 763 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 1500 frí við tíðini 15:52.82.

Hetta var fyrsta Føroyameistarastevna nakrantíð á langgeil í Føroyum.

**Føroysk met og juniormet (50m)**

Signhild Joensen (2000), Ægir 1:04.67 í 100 rygg

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:32.04 í 200 firvald

Róland Toftum (1998), SuSvim 30.01 í 50 bringu

Ægir-kvinnur (1996) 8:55.15 í 4x200 frí

**Hartil føroysk met (50m)**

SuSvim-menn (1996) 4:12.18 í 4x100 blandað, 3:42.95 í 4x100 frí

Óli Mortensen (1996), HS 2:06.05 í 200 firvald

Astrið Foldarskarð (1994), HS 27.21 í 50 frí

Ægir-kvinnur (1996) 4:34.16 í 4x100 blandað

HS-menn (1996) 8:11.63 í 4x200 frí

HS-kvinnur (1994) 4:04.84 í 4x100 frí

**Hartil føroysk juniormet (50m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 1:04.75 í 100 firvald

Signhild Joensen (2000), Ægir 30.64 í 50 rygg

SuSvim-gentur (1999) 4:56.34 í 4x100 blandað

Ægir-gentur (1999) 4:06.78 í 4x100 frí

## HS-stevna í Gundadali 2. - 3. apríl 2016

40 kappingar, 6 feløg, 99 íðkarar, 36 liðsvimjingar og 570 úrslit. Besta úrslit gav 506 FINA stig, tá ið Alisa Vestergaard (2003) úr Suðuroyar Svimjifelag svam 100 frí við tíðini 1:03.86.

## JM/MU í Klaksvík 23. - 24. apríl 2016

38 kappingar, 6 feløg, 140 íðkarar, 64 liðsvimjingar og 1076 úrslit. Besta úrslit gav 736 FINA stig, tá ið Marius Ihlen Gardshodn (1998) úr Havnar Svimjifelag svam 800 frí við tíðini 8:11.10.

**Føroysk met og juniormet (25m)**

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 1:04.67 í 100 rygg

**Hartil føroysk juniormet (25m)**

Róland Toftum (1998), SuSvim 29.07 í 50 bringu

Róland Toftum (1998), SuSvim 1:04.10 í 100 bringu

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 1:04.93 í 100 blandað

Ægir-gentur (1999) 3:59.07 í 4x100 frí

HS-dreingir (1998) 1:54.65 í 4x50 blandað




## FM á stuttgeil í Gundadali 5. - 7. mai 2016

69 kappingar, 6 feløg, 67 íðkarar, 29 liðsvimjingar og 657 úrslit. Besta úrslit gav 771 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 1500 frí við tíðini 15:20.32.

**Føroysk met (25m)**

Óli Mortensen (1996), HS 2:02.61 í 200 firvald

Ægir-kvinnur (1996) 3:55.66 í 4x100 frí

HS-kvinnur (1994) 1:46.94 í 4x50 frí

**Hartil føroysk juniormet (25m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:24.04 í 200 firvald

Vár E. Eidesgaard (1998), HS 17:26.75 í 1500 frí

Ægir-gentur (1999) 1:49.29 í 4x50 frí




# *Kappingarárið 2016-2017*

## HS-stevna á Argjum 17. september 2016

25 kappingar, 3 feløg, 31 íðkarar, 2 liðsvimjingar og 107 úrslit.

## HS-stevna í Gundadali 24. - 25. september 2016

34 kappingar, 5 feløg, 86 íðkarar og 500 úrslit. Besta úrslit gav 771 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 1500 frí við tíðini 15:20.32.

**Føroysk juniormet (25m)**

Róland Toftum (1998), SuSvim 29.00 í 50 bringu

Róland Toftum (1998), SuSvim 1:03.43 í 100 bringu

# Open Water

Svimjing á sjónum vindur alt meira uppá seg, her heima í Føroyum, har serliga vaksin venja og kappast á sjónum, og eisini royna nýggjar leiðir sum til dømis Leitisvatn og Tangafjørð.



## Jóansøkusvimjing í Vági 1. juli 2016

Suðuroyingar skipaðu fríggjadagin hin 1. juli fyri Jóansøkusvimjing á fjørðinum í Vági.

## Túrur út á Flesjarnar og til Nes 3. juli 2016

Sunnudagin hin 3. juli 2016 svumu 9 rørslusvimjarar hjá HS úr Akkersvík út á Flesjarnar, og síðani nakrir av teimum víðari til Nes, Eysturoy.

## Ólavsøkusvimjing í Tórshavn 28. juli 2016

Havnar Svimjifelag skipaði Ólavsøkuaftan fyri 400m havsvimjing fram við Molanum í Havn.

## Nólsoyingarsvimjing 13. august 2016

Nólsoyingar skipaðu leygardagin hin 13. august fyri Nólsoyarsvimjing, 19. árið á rað.

## Svimjing á Sjómannadegnum 20. august 2016

Ægir skipaði leygardagin hin 20. august fyri svimjing tvørtur um vánna í Klaksvík, sum partur av Sjómannadegnum 2016.




## Christiansborg Rundt 27. august 2016

Leygardagin hin 27. august 2016 skipaði Dansk Svømmeunion fyri svimjing í kanalunum rundt Christiansborg. Óli Mortensen vann silvur á 2 km teininum, í kapping við umleið 3300 svimjarar.

## Havsvimjing á Mentanardøgunum í Fuglafirði 3. september 2016

Fuglafjarðar Svimjifelag skipaði fyri havsvimjing í Fuglafirði hin 29. august 2015.

# Altjóða stevnur

Einir 55 føroyskir svimjarar luttóku tilsamans 570 ferðir í altjóða kapping uttanlanda, svimjiárið 2015-2016, á 11 stevnum har annaðhvørt SSF ella føroysk svimjifeløg skipaðu fyri ferðini. Hartil skipaðu vit sjálvi fyri stóru stevnuni NOM 2015, umframt at Pál Joensen luttók undir donskum flaggi á Olympisku Leikum í Rio de Janeiro.

## Nordic Open Masters í Tórshavn 2. - 4. oktober 2015

32 kappingar, 67 feløg, 269 íðkarar og 978 úrslit. Besta úrslit gav 591 FINA stig.

Svimjisamband Føroya skipaði fyri Nordic Open Masters Championships 2015, í Svimjihøllini í Gundadali. Tilsamans 318 svimjarar úr 8 londum luttóku, har tann yngsti var 25 og hin elsti 93. Føroyingar vunnu tilsamans 21 gull, 9 silvur og 22 bronsur, og HS varð mest vinnandi felag.

## World Cup stevna í Doha 2. - 3. november 2015

Pál Joensen (1990, SuSvim), Óli Mortensen (1996, HS) og Alvi Hjelm (1996, Ægir) luttóku á World Cup stevnuni í Doha 2015, har frægasta úrslit var Pál 15:13.69 og nr 5 í 1500 frí.

## World Cup stevna í Dubai 6. - 7. november 2015

Pál Joensen (1990, SuSvim), Óli Mortensen (1996, HS) og Alvi Hjelm (1996, Ægir) luttóku á World Cup stevnuni í Dubai, har tað eydnaðist Páli at vinna bronsu í 1500 frí við tíðini 15:08.90.

**Heiðursmerki**

Pál Joensen (1990), SuSvim 15:08.90 og bronsu í 1500 frí

## Køge Open 27. - 29. november 2015

FS luttók á Køge Open hin 27. - 29. november, við 10 svimjarum íroknað venjaran.

## EM á stuttgeil í Netanya 2. - 6. desember 2015

Føroyska svimjilandsliðið á EM á stuttgeil 2015 vóru: Pál Joensen (1990, SuSvim), Alvi Hjelm (1996, Ægir) og Astrið Foldarskarð (1994, HS). Ferðaleiðarar vóru Thurid Kjærbo og Rókur í Jákupsstovu, og venjari var Rui Magalhaes. Óli Mortensen (1996, HS) hevði eisini klárað kravtíð,

men bað seg undan fyri heldur at miðsavna seg um kapping á langgeil á Amsterdam Swim Cup, vikuskiftið aftaná hetta EM.

## Amsterdam Swim Cup 11. desember 2015

Óli Mortensen (1996) luttók fyri Havnar Svimjifelag á langgeilastevnuni Amsterdam Swim Cup 2015, sum liður í fyrireikingini at klára kravtíð til OL 2016. Hann varð nr 8 í 1500 frí.

## NM/NJM í Bergen 11. - 13. desember 2015

Føroyska svimjilandsliðið á NM/NJM 2015 vóru: Ásbjørg Hjelm (1999), Barbara Debes (2000), Jana B. Thomsen (2000), Signhild Joensen (2000), Jonna B. Thomsen (1996), Rókur Trygvason (2000) og Alvi Hjelm (1996) úr Ægir, Maria B. Antoft (2000), Lív E. Eidesgaard (1999), Súsanna Tummasardóttir (2001), Vár E. Eidesgaard (2001), Marius I. Gardshodn (1998), Beinta P. Debes (1997) og Lena Rannváardóttir (1998) úr HS, og Sára R. Nysted (2001), Rói Bech (2001), Róland Toftum (1998) og Eyðbjørn Joensen (1996) úr SuSvim. Ferðaleiðarar vóru Katrin Sørensen og Sørin S. Djurhuus, og venjarar H. Rúni Gaardbo og Dr. Juan Jaime Arroyo Toledo.

**Føroysk met og juniormet (25m)**
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:16.52 í 200 blandað
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 4:50.30 í 400 blandað
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 4:18.31 í 400 frí
SSF-gentur (2000) 8:29.72 í 4x200 frí
SSF-dreingir (1998) 7:58.75 í 4x200 frí

**Hartil føroysk juniormet (25m)**
Róland Toftum (1998), SuSvim 1:04.43 í 100 bringu
Róland Toftum (1998), SuSvim 2:19.52 og 2:19.37 í 200 bringu
SSF-gentur (2000) 3:56.68 í 4x100 frí og (1999) 4:21.80 í 4x100 blandað
SSF-dreingir (1998) 3:38.37 í 4x100 frí og 4:05.71 í 4x100 blandað

**Finalupláss NM**

Alvi Hjelm (1996) í 200 og 400 frí, og 200 og 400 blandað, Beinta P. Debes (1997) í 100 og 200 bringu, Jonna B. Thomsen (1996) í 100 firvald og 200 blandað, Lena Rannváardóttir (1998) í 400 og 800 frí, Ásbjørg Hjelm (1999) í 50 bringu, Signhild Joensen (2000) í 50 rygg.

**Heiðursmerki NM**

Alvi Hjelm (1996), Ægir bronsu í 400 blandað.

**Finalupláss NJM**

Sára R. Nysted (2001) í 400 og 800 frí, og 200 og 400 blandað, Signhild Joensen (2000) í 100 og 200 rygg, Marius I. Gardshodn (1998) í 400 og 1500 frí, Vár Eidesgaard (2001) í 800 frí, Ásbjørg Hjelm (1999) í 100 bringu, Róland Toftum (1998) í 200 bringu, Rói Bech (2001) í 200 firvald.

Hartil stafettirnar 4x100 frí og blandað, og 4x200 frí, hjá gentum og dreingjum.

**Heiðursmerki NJM**

Marius Gardshodn (1998), HS silvur í 1500 frí
Sára Nysted (2001), SuSvim bronsu í 200 og 400 blandað.

## Reykjavík International 22. - 24. januar 2016

Suðuroyar Svimjifelag, Ægir og Reysti luttóku á Reykjavík International 2016, við avbera góðum úrslitum. Føroyskir svimjarar vunnu her tilsamans eini 8 gull, 9 silvur og 7 bronsur, harav 2 gull vóru í aldursbólkinum 2002 og yngri, meðan rest var 2001 og eldri.

**Føroysk met og juniormet (50m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 5:00.47 í 400 blandað
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:20.41 í 200 blandað
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:06.76 í 200 frí
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:33.76 í 200 firvald
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:18.11 í 200 rygg
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 58.67 í 100 frí

Róland Toftum (1998), SuSvim 30.45 og 30.03 í 50 bringu

Signhild Joensen (2000), Ægir 1:05.60 í 100 rygg

**Hartil føroysk juniormet (50m)**

Róland Toftum (1998), SuSvim 1:07.76 og 1:06.87 í 100 bringu

Róland Toftum (1998), SuSvim 2:23.72 í 200 bringu

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 1:06.39 í 100 rygg

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 1:06.58 í 100 firvald

**Heiðursmerki 2001 og eldri**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:06.76 og gull í 200 frí

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 9:18.70 og gull í 800 frí

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:20.41 og gull í 200 blandað

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 5:00.57 og gull í 400 blandað

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 58.67 og silvur í 100 frí

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:18.11 og silvur í 200 rygg

Róland Toftum (1998), SuSvim 30.03 og gull í 50 bringu

Róland Toftum (1998), SuSvim 2:23.72 og gull í 200 bringu

Róland Toftum (1998), SuSvim 24.38 og silvur í 50 frí

Róland Toftum (1998), SuSvim 1:06.87 og silvur í 100 bringu

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 34.67 og silvur í 50 bringu

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 2:47.05 og silvur í 200 bringu

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 1:16.19 og bronsu í 100 bringu

Alvi Hjelm (1996), Ægir 4:41.01 og silvur í 400 blandað

Alvi Hjelm (1996), Ægir 1:59.28 og bronsu í 200 frí

Alvi Hjelm (1996), Ægir 4:13.85 og bronsu í 400 frí

Alvi Hjelm (1996), Ægir 2:11.67 og bronsu í 200 blandað

Eyðbjørn Joensen (1996), SuSvim 25.89 og silvur í 50 firvald

Rókur Trygvason (2000), Ægir 2:31.42 og silvur í 200 bringu

Signhild Joensen (2000), Ægir 30.71 og bronsu í 50 rygg

Signhild Joensen (2000), Ægir 1:05.60 og bronsu í 100 rygg

Signhild Joensen (2000), Ægir 2:24.17 og bronsu í 200 rygg

**Heiðursmerki 2002 og yngri**

Alisa Vestergaard (2003), SuSvim 4:52.74 og gull í 400 frí

Alisa Vestergaard (2003), SuSvim 10:18.22 og gull í 800 frí



## Danish Open 13. - 17. apríl 2016

Suðuroyar Svimjifelag, SuSvim og Ægir luttóku á Danish Open 2016, umframt Pál fyri sítt danska felag Aalborg Svømmeklub. Føroysku svimjararnir komu í nógvar finalur, og vunnu tilsamans 3 gull og 2 bronsur, umframt at seta 7 føroysk met og 6 føroysk juniormet. Pál Joensen kvalifiseraði seg til OL í Rio 2016, og Óli Mortensen kláraði hartil B-kravtíðina ásetta av FINA til OL 2016.

**Føroysk met og juniormet (50m)**

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 17:25.28 í 1500 frí

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 9:09.34 í 800 frí

Signhild Joensen (2000), Ægir 1:04.54 í 100 rygg

Signhild Joensen (2000), Ægir 30.07 í 50 rygg

Róland Toftum (1998), SuSvim 29.89 og 29.81 í 50 bringu

**Hartil føroysk met (50m)**

Astrið Foldarskarð (1994), HS 27.19 og 27.06 í 50 frí

Alvi Hjelm (1996), Ægir 4:30.17 í 400 blandað

**Hartil føroyskt juniormet (50m)**

Signhild Joensen (2000), Ægir 30.50 í 50 rygg

**Heiðursmerki**

Óli Mortensen (1996), HS 8:10.94 og gull í 800 frí

Óli Mortensen (1996), HS 15:38.41 og bronsa í 1500 frí

Pál Joensen (1990), SuSvim 15:04.13 og gull í 1500 frí

Alvi Hjelm (1996), Ægir 4:30.17 og gull í 400 blandað

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 17:25.28 og bronsu í 1500 frí

## IMOC í Hafnarfirði 29. - 30. apríl 2016

Rørslusvimjarar hjá Havnar Svimjifelag luttóku á íslendsku meistarastevnuni fyri masters, við avbera góðum úrsliti. Tilsamans kappaðust tey 54 ferðir, og vunnu tá 15 gull, 7 silvur og 13 bronsur.



## EM í London 16. - 22. mai 2016

Føroyska svimjilandsliðið á EM 2016 vóru: Pál Joensen (1990) og Sára R. Nysted (2001) úr Suðuroyar Svimjifelag, Alvi Hjelm (1996) og Signhild Joensen (2000) úr Ægir, og Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag. Ferðaleiðarar vóru Thurid Kjærbo og Rókur í Jákupsstovu, og venjari Rui Magalhaes. Hartil umboðaði Dann Hjelm okkum sum dómari á hesi stevnu.

Hendan stevnan eydnaðist ikki serliga væl, í mun til onnur ár. Eingin svimjari rakk nakra bestu tíð, og eiheldur fingu vit okkara besta svimjara í finalu.

## EJM í Ungarn 6. - 10. juli 2016

Føroyska svimjilandsliðið á EJM 2016 vóru: Signhild Joensen (2000), Ásbjørg Hjelm (1999) og Jana B. Thomsen (2000) úr Ægir, Marius I. Gardshodn og Vár E. Eidesgaard (2001) úr Havnar Svimjifelag, og Sára R. Nysted (2001) og Róland Toftum (1998) úr Suðuroyar Svimjifelag. Ferðaleiðari var Katrin Sørensen og venjari Jón Bjarnason.

Stevnan eydnaðist rættiliga væl, um enn ikki allir svimjarar rukku sínar bestu tíðir.

**Føroysk met og juniormet (50m)**
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 4:59.73 í 400 blandað
Sára R. Nysted (2001), SuSvim 4:22.79 í 400 frí

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:05.66 í 200 frí

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 34.61 í 50 bringu

## NMU í Tampere 9. - 10. juli 2016

Føroyska svimjilandsliðið á NMU 2016 vóru: Alisa Vestergård (2003), Brynhild Johannesen (2002), Hugin Næs Lave (2001) og Rói Bech (2001) úr Suðuroyar Svimjifelag, Eyðrið Mortensen (2003), Karin Midjord (2001), Súsanna Tummasardóttir (2001) og Johan N. Dam (2002) úr Havnar Svimjifelag, og Sólvá A. Sigurðsson (2002) og Rókur Trygvason (2000) úr Ægir. Ferðaleiðarar vóru Anni á Hædd og Annika Næs Johannesen, og venjari Rúni Gaardbo.

Hendan stevnan eydnaðist sera væl, um enn støðið var so mikið høgt í mun til hesar ungu svimjarar, at vit ikki rukku nakað heiðursmerki. Heilt nógv persónlig met vórðu sett.

## Olympisku Leikir í Rio de Janeiro 6. - 13. august 2016

Pál Joensen (1990, SuSvim) luttók á Olympisku Leikum 2016, við hesi skipan har føroyskir svimjarar kunnu klára kravtíð ásetta av Dansk Olympisk Komite, til at kunna umboða Danmark á OL. Tað gekk ikki sum ætlað hjá Páli á OL 2016, har hann við tíðini 15:18.49 varð nr 30 av 45 í innleiðandi 1500 frí.

Jon Hestoy umboðaði SSF og Føroyar sum dómari til open water stevnuna á OL í Rio 2016.


SAIDA
MEN'S 1500M FREESTYLE
Panasonic

# Met

Føroyskir svimjarar settu tilsamans 46 føroysk met og 62 føroysk juniormet, svimjiárið 2015-2016, tað vil siga frá 1. september 2015 til 31.  august 2016.

Hartil setti Róland Toftum juniormet í 50 og 100 bringu á stuttgeil, nú við svimjiársbyrjan 2016-2017.

Svimjararnir vóru:

- Sára R. Nysted (2001), SuSvim - 16 føroysk met, 22 føroysk juniormet
- Róland Toftum (1998), SuSvim - 5 føroysk met, 14 føroysk juniormet
- Signhild Joensen (2000), Ægir - 5 føroysk met, 9 føroysk juniormet
- Vár E. Eidesgaard (2001), HS - 3 føroysk met, 4 føroysk juniormet
- Astrið Foldarskarð (1994), HS - 3 føroysk met
- Óli Mortensen (1996), HS - 2 føroysk met
- Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir - 1 føroyskt met, 1 føroyskt juniormet
- Alvi Hjelm (1996), Ægir - 1 føroyskt met

Hartil liðsvimjingar hjá feløgum og landsliði.

Til ber at finna øll met og allar tíðir hjá føroyskum svimjarum síðani einaferð í 2008, íroknað at síggja gongdina í bestu tíðum í einhvørjari grein, við at fara á swimrankings.net

# Gullnálir

Tvær gullnálir vórðu handaðar á FM á stuttgeil 2016:

Marius Ihlen Gardshodn (1996) úr Havnar Svimjifelag fekk gullnál fyri á NJM 2015 at hava svomið seg til 15:35.23 (og silvurheiðursmerki) í 1500 frí.

Signhild Joensen (2000) úr Ægir fekk gullnál fyri í riðlunum á Danish Open 2016 at hava svomið seg til 1:04.54 (og føroyskt met) í 100 rygg. Hon luttók í finaluni eisini, men varð tá kolldømd.

# Annað virksemi 2015-2016

## NSF

Norðurlendska svimjisambandið NSF hevði sín árliga fund fyri aðalskrivarar og ítróttarstjórar í Farum hin 28. januar 2016. Hesin fundur fyrireikar kalendaran fyri m.a. NM/NJM og NMU; umframt møgulig broytingaruppskot til reglugerð NSFs til fylgjandi aðalfund. Fyri SSF luttóku Djóni Dalsgarð og Rókur í Jákupsstovu. Næsti fundur verður í Føroyum hin 26. januar 2017.

Dagin eftir var fundur í Kastrup, har norðurlendsku svimjisambondini umrøddu serliga komandi valið í LEN, og møguligar innstillingar til nevndarsessir har. Fyri SSF luttóku her Jon Hestoy og Rókur í Jákupsstovu, Jon sum okkara umboð í LEN.

Aðalfundur NSF varð hildin við hin Bosön nær Stockholm 4. juni 2016. Fyri SSF luttóku Jon Hestoy, Djóni Dalsgarð og Rókur í Jákupsstovu. Millum annað varð fastlagt at næsta NMU verður í Vági í juli 2017, og at vit eisini koma at hýsa NM/NJM 2019 og NOM 2020.

Norðurlendska svimjisambandið er sum heild ein væl samansmíðað eind, ið dregur somu línu innan flestu viðurskifti undir LEN og FINA, og sum nú eisini aftaná aðalfundin hjá LEN hevur fingið fleiri og tyngri sessir í LEN.

## LEN

LEN hevði sín árliga aðalfund í London hin 8. mai 2016, har tað í ár var val á skrá, og stríðsval millum sitandi forseta Paolo Barelli, og starvsnevndarlimin Eric van Heijningin. Fyri SSF luttóku Jon Hestoy og Rókur í Jákupsstovu. Úrslitið av aðalfundin varð at Paolo Barelli vann ógvuliga greitt, og at vit í SSF afturat at hava Jon Hestoy sum varaformann í Open Water nevndini hjá LEN, nú eisini hava undirritaða Rók í Jákupsstovu í pressunevndini hjá LEN.

## Open Water

Jon Hestoy er í nevndunum fyri Open Water bæði í LEN og FINA, og hevur í hesum sambandi millum annað verið dómari á EM 2016 og OL í Rio de Janeiro 2016, umframt yvirdómari á EJM 2016 og umboð á OW Cup fyri LEN í Keypmannahavn 2016 og fyri FINA í Dubai 2016.

## Úrval

Úrval hevði til 2016 sítt næsta veruliga umsóknarumfar, har vit í SSF fingu játtað stuðul til Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag sum einasti íðkari hoyrandi til 1. bólk í stuðulsskipan Úrvals, og síðani fylgjandi 6 svimjarar sum íðkarar hoyrandi til 2. bólk: Vár E. Eidesgaard (2001), Marius I. Gardshodn (1998) og Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag, Alvi Hjelm (1996) og Signhild Joensen (2000) úr Ægir, og Sára R. Nysted (2001) úr Suðuroyar Svimjifelag.

Nú mánadagin hin 17. oktober lótu vit inn umsóknir til Úrval fyri 2017, og eru tær 9 í tali, umframt ein eyka frá okkum í SSF til felagstiltøk til teir svimjarar sum eru beint uttanfyri bólk 2. Í ár hava feløg og svimjarar í størsta mun skrivað umsóknirnar sjálvi, og sær tað út til at hava riggað væl. Úrvalsskipanin er rættiliga krevjandi fyri okkum sjálvbodnu í sersambandi og feløgum, vegna tey útgreinaðu krøv sum verða sett til umsóknir og frásagnir. Men vit royna okkara besta.

## Lívbjarging

Lívbjargingarskipan SSF er komin í eina góða legu, og styrkist alsamt við vaksandi áhuga hjá feløgum, kommununum, svimjihallum og stovnum at fáa nøktandi lívbjargingarprógv. Vit í SSF royna nú tað vit kunnu at fáa formligar avtalur við tær kommunur sum hava svimjihøll, og við Mentamálaráðið, fyri okkara viðkomandi til ein dag at røkka tí endamáli, at eingin svimjing skal fara fram í føroyskum svimjihallum, uttan at nøktandi lívbjarging er til staðar. Umframt sjálvi at menna okkara skipanir og mannagongdir, til at kunna handfara hendan vaksandi tørv.

## Svimjiskúlin

Hóast tað er nakað síðani at vit høvdu skeið fyri svimjiskúlalærarar og -venjarar, so koyrir sokallaða Merkjaskipanin enn úti í feløgum og skúlum, sum varð innførd í prinsippinum heilt afturi í 90-unum, við endurupplívan í 2007 ella har á leið. Talan er um norska svimjiskúlan, sum Pálin Olsen og Rúni Gaardbo hava føroyskað og tillagað, og sum Jórun Eið Johannesen og undirritaði síðani saman við teimum hava havt skeið í. Dansk Svømmeunion skipar nú í november fyri norðurlendskari ráðstevnu um svimjiskúlar, har í øllum førum tey trý Pálin, Rúni og Jórun luttaka.

Jórun Eið Johannesen og Rúni Gaardbo vóru hartil á NEG 2016 í Billund í apríl 2016, sum er reglulig ráðstevna um svimjiundirvísing, fyriskipað av Nordic Education Group.

## Yvirdómaraskeið

SSF skipar nú hin 4. til 6. november saman við DGI fyri uppfylgjandi yvirdómaraskeiði í ÍSF-húsinum, har ein høvuðsuppgáva er at tilevna okkara egnu dómaraútbúgving. Luttakararnir verða, Rúni Gaardbo (FLOT), Katja Keles (Reysti), Thurid Kjærbo (SuSvim) og Annika Næs Johannesen (SuSvim), umframt Dann Hjelm (SSF) og Elin Matras (Ægir). Dann Hjelm hevur í hesum sambandi havt nógv samskifti við danska skeiðshaldaran, til at fyrireika skeiðið.

Katja Keles var hartil á FINA dómaraskeiði í Reykjavík í apríl 2016.

## Gransking

Føroyskir svimjarar luttóku í granskingarverkætlan hjá Fróðskaðarsetri Føroya og Københavns Universitet, at kanna um ein 3 min all-out test á svimjiergometri er viðkomandi fyri svimjing. Fyribils úrslitini eru lovandi, men vóru tað tíverri í so fáir svimjarar sum lótu seg testa, so at endaliga úrslitið má bíða eitt sindur.



## Anti-doping

Nú í ár varð avdúkað, at ÍSF í 2014 og 2015 ikki hevði skipað fyri nøkrum dopingeftirliti. Hetta er sjálvsagt undir alt lágmark, og kom tað lukkutíð í rættlag aftur, tá ið ÍSF skipaði fyri einum umfari

av dopingkanningum, sama vikuskiftið sum FM á stuttgeil 2016 var í Tórshavn. Tilsamans 14 dopingroyndir vórðu tiknar um tað mundið, harav einar 8 av svimjarum.

## Breidd

Aftur í ár hevur tað verið í so soltið við breiddartiltøkum hjá SSF, partvís tí at fíggjarútlitini vóru ivasom, og partvís tí at tær kreftir sum vit hava at ráða yvir, hava verið upptiknar av øðrum uppgávum. Ætlaði túrurin til Bergen Swim Festival varð avlýstur, sum annars eisini skuldi umfata team building á Dale Oen sentrinum. Ætlanin er nú heilt greitt at fáa landsliðslegur ella líknandi virksemi í lag aftur, og breiddarvirksemi í tann mun sum tað er orka til tess.

## FS 40 ár

Fuglafjarðar Svimjifelag fylti 40 ár í 2015 og hátíðarhelt hetta við veitslu í Fuglafirði hin 11. november 2015.

## Stuðul

Atlantic Airways hevur nú í nøkur ár verið einsamallur høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya, við endurnýggjaðari avtalu aftur í ár.

# ÍSF

Sum flestum kunnugt, so hevur hetta farna árið verið rættiliga turbulent, tá ið tað kom til viðurskiftini millum ÍSF og SSF.

Vit  hava saman við flogbóltinum og hondbóltinum verið í einum meira og meira isoleraðum minniluta, sum millum annað ynskti at felagsskapurin viðgjørdi ætlaða býtislykilin; men sum at enda mátti stríðast fyri yvirhøvur at hava nakra ávirkan, tá ið nýggj starvsnevnd skuldi veljast til ÍSF.

Vit fingu tá Jon Hestoy inn sum næstformann í ÍSF, og høvdu eisini ein jaligan fund við nýggju starvsnevndina, stutt aftaná aðalfundin í mai. Hetta vóru fundir sum nýggja starvsnevndin hevði við hvørt sersamband sær, til at hoyra um teirra gerandisvirksemi, og um teirra framtíðarvánir.

Tá varð millum annað latið upp fyri at vit í ÍSF skuldu kunna endurskoða hendan nýggja býtislykil, í fyrstu atløgu við at fíggjarnevnd ÍSF fór at skipa fyri einum líknandi fundarumfari sum starvsnevnd ÍSF, tó nú sjálvsagt meira til at hoyra um fíggjarstøðu og -ætlanir hjá sersambondum.

Og nú bíða vit so eftir at hesin fundur verður, umframt regluliga Umboðstingið, sum sambært lóg ÍSF skal vera hvørt hálvár, til at umrøða árskalendara, mál og strategi, og fíggjarætlan fyri ÍSF.

Eitt Umboðsting hevur verið, har skráin var avmarkað til umrøðu av møguligum nýggjum ÍSF-húsi.

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Niðurløga

Nú nærkast endin á hesi 2 ára setu hjá mær sum formaður í Svimjisambandi Føroya, og er kenslan at hetta var nú ikki so galið, hóast onkra tunga løtu viðhvørt.

Hetta síðsta árið var merkt av rokinum í ÍSF, har vit fyri so vítt høvdu tapt, longu tá ið stríðið byrjaði, men vónandi tó hava megnað at ávirka okkurt til fyrimuns fyri eisini føroyska svimjing.

Í løtum tykist tað sum um, at mong ikki ynskja meira framgongd fyri svimjingina, og tí heldur velja at mótarbeiða okkum. Tí tað er lættari at pilka onnur niður, enn at byggja sítt egna upp.

Men, so er tað at enn ein knorlur fer upp á ein skammil, og svimur eina tíð sum sigur spar frúgv. Til dømis fyri egna rokning, ein kaldan januardag í Reykjavík.

Og so er tað aftur tað heila vert.

Føroysk svimjing kundi verið nógv betri, um vit fingu betri umstøður, og meira pening at ráða yvir.

Men, føroysk svimjing er eisini fantastisk, sum hon er.

So vit koyra á og leggja ætlanir, so at svimjingin smátt um smátt verður betri og betri. Til at fylgja umheiminum, og tí at vit ikki hava nakra orsøk til at ivast í, at vit kunnu verða nógv betri.

Takk til tykkum øll sum leggja í og stuðla føroyskari svimjing.

Við svimjikvøðu

Toftir 20. oktober 2016

Vegna starvsnevnd SSF

Rókur í Jákupsstovu